# Lena verður ljóðblandað av Red Hot Chili Peppers blandara

**Ein av heimsins mest eftirspurdu ljóðblandarum hevur persónliga valt Lenu framum nógvar aðrar verkætlanir, tí hann vildi sleppa at ljóðblanda hana.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*





*Hewitt hevur eitt skitið og feitt ljóð, ið kann gerast sera spennandi saman við Lenu.*

Lena og Niclas leggja í hesum døgum síðstu hond á upptøkurnar av komandi fløguni hjá føroyskt/kanadisku songkvinnuni. Upptøkurnar eru gjørdar í útvarpinum og í Abbey Road upptøkuhølunum í London, og at døma eftir konsertframførslunum er talan um tann besta tónleikin, ið Lena og Niclas hava skrivað saman.

Nú sær tað út til, at løgini eisini fara at ljóða sera væl. Lena hevur tryggjað sær ein av heimsins mest eftirspurdu ljóðblandarum, til ljóðblanda fløguna. Ryan Hewitt, ið hevur ljóðblandað eina av best seljandi fløgunum hetta summarið Stadium Arcadium hjá Red Hot Chili Peppers, hevur játtað at ljóðblanda fløguna. Lena sigur, at teimum dámdi væl ljóðið á Stadium Arcadium, og tí settu tey seg í samband við umboðsmannin hjá Hewitt. Prísurin var tó alt ov høgur, so hetta var av fyrstan tíð av ongum. Men nakrar dagar seinni setti umboðsmaðurin seg aftur í samband við Lenu. Mest sum av tilvild var Ryan Hewitt komin inn á skrivstovuna hjá umboðsmanninum, meðan hann var á myspace síðuni hjá Lenu. Hewitt vildi vita hvør hetta var sum sang, og tá umboðsmaðurin segði, at hetta var handan daman, sum hann júst hevði avvíst, segði Hewitt “Men eg vil sleppa at ljóðblanda hana!”. Hesin maður, ið kann velja og vraka hvønn hann arbeiðir við, valdi sostatt sjálvur Lenu.

Hewitt hevur eitt skitið og feitt ljóð, ið kann gerast sera spennandi saman við Lenu.

Enn eru upptøkurnar ikki heilt komnar í hús og enn er eingin útgávudagur funnin, men vit bíða í spenningi eftir hesum, ið illa kann gerast annað enn eitt meistaraverk.

# G!Festivalurin í Morgunblaðnum



Íslendska Morgunblaðið hevði í gjár langa frásøgn frá G!Festivalinum, tað var Føroyavinurin og tónleikaummælarin Arnar Eggert Thoroddsen, ið aftur hevði vitja á klettunum, og í greinini verður Føroyaferðin lýst.

Her er ikki talan um ummælir av konsertum á G!, men heldur um eina langa hugleiðing um føroyskan tónleik, føroyskan samleika og samfelagsviðurskifti sum heild.

Her verður m.a. hugleitt um ríkissambandið, um lógina um fosturtøku og um manglndi verndina hjá samkyndum í føroysku løggávuni. Blaðmaðurin undrast á, at eitt land, ið er so frammaliga á tónlistarøkinum, kann vera so langt afturi á øðrum økjum. Í stóran mun snýr greinin seg um føroyskan tónleik, og er við til at halda lív føroysku alduni í Íslandi.

**nud**

## Rætting

Í greinini »Klaksvíkingar hava keypt handilsimperiið hjá Ossa« í Sosialinum í gjár skrivaðu vit, at Norðoyar Sparikassi m.a. hevði keypt Frants Restorff í Tórsgøtu. Hetta kundi skiljast sum um, tað var bygningurin, ið handilin heldur til í, men talan er einans um virksemið altso innbúgv og maskinur. P/F Frants Restorff eigur bygningarnir, ið virksemið heldur til í.



# Fiskur, fuglur og festligur fyrrapartur

Hugnaligt festivaltorg verður leygarmorgunin á Summarfestivalinum, har fólk kunnu keypa lunda, grind og spik, fríska og spennandi frukt, heimagjørdan ís, festivalútbúnað, summarklæðir og nógvar aðrar freistandi vørur.

Mánadagin, týsdagin og mikudagin uppundir festivalin fara flest allir handlar í Klaksvík at hava opið til klokkan 8 um kvøldið. Hósdagurin, sum er eitt slag av “ Lítla festivalaftan” við tónleiki og undirhaldi í býnum, kunnu norðoyingar og festivalgestir hugna sær í býnum til klokkan 23.

Fríggjakvøldið fara handlarnir eisini at spíla seg út, og ivaleyst fara teir sum liggja tættast við festivaløkið, eisini hetta kvøldið at hava hurðarnar opnar til seint út á kvøldið

Leygardagin ber eisini til at keypa inn í Klaksvík, og á vakra túninum í miðbýnum verður skipað fyri hugnaligum sølumarknaði frá klokkan 10 til middags, har Kátu Hornini, Crawling blue og Peter Thorup Trio fara at spæla góðan summarjazz og nógvar góðar vørur verða at fáa.

# James Hetfield viðmælur The Rasmus

Eftir eina konsertferð í Japan seinasta februar mánað vóru teir fýra ungu tónleikararnir í The Rasmus bidnir at hita upp fyri Metallica.

Metalúrmælingarnir við føstum bústaði í San Francisco vóru í mars á ferð í Suður Afrika og lótu væl at unga finska bólkinum. James Hetfield, sum er forsangari og annar av guitarleikarunum í Metallica, segði við ein tíðindamann hjá finska tónleikablaðnum Soundi Music Magazine : – "The Rasmus er ein áhugaverdur bólkur og eg haldi at løgini á fløguni Dead Letters eru frálík. Teir minna meg á 1980ini og bólkar sum eitt nú Def Leppard."

**nud**

# Roger Hodgson í stórari veitslu um vikuskiftið

Summarfestival aktuelli Roger Hodgson, hevur av álvara gjørt um seg aftur á bæði kanadiskum og amerikonskum festivalum Gamli Supertramp oddamaðurin er eisini í Evropa ein eftirspurdur maður. Danski Langelandsfestivalurin, sum lýsir seg sjálvan við orðunum Danmarks Største Havefest hevði um vikuskiftið vitjan av bretanum, sum leygarkvøldið var á pallinum har hann framførdi eitt úrval av sínum kendastu løgum. Hodgson verður at hoyra leygarkvøldið 5.august kl.21.00 á Summarfestivalinum í Klaksvík.

**nud**